# KÍ hevði risahall

**Mánakvøldið var aðalfundur í KÍ, og roknskapurin fyri í fjør vísti eitt hall upp á umleið 650.000 krónur**

AÐALFUNDUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hetta er tíðin, tá ið fleiri av ítróttarfeløgunum kring landið hava sínar aðalfundir. Í blaðnum í gjár greiddu vit frá aðalfundinum hjá NSÍ, sum vísti, at felagið hjá runavíkingum hevði eitt fíggjarligt vánaligt ár í fjør. Mánakvøldið hevði KÍ aðalfund, og úrslitið hjá teimum var verri enn tað hjá NSÍ.

## Fíggjarstøðan er vánalig

Sum skilst vísti ársroknkapurin hjá KÌ fyri 2004 eitt hall upp á umleið 650.000 krónur. Formaðurin í KÍ, Gestur Hovgaard, vil ikki vátta hetta tal, men hann sigur, at tað er væl møguligt, at tað er rætt. Gestur Hovgaard viðgongur tó, at talan var um eitt fíggjarligt stak vánaligt ár hjá KÍ.

– Úrslitið var als ikki nøktandi. Tað eru fleiri orsøkir til, at úrslitið gjørdist so mikið vánaligt. Eitt nú vóru nógvar útreiðslur í sambandi við 100 ára stovningardagin hjá felagnum í fjør, greiðir Gestur Hovgaard frá.

Spurdur hvussu fíggjarstøðan hjá KÍ sær út, sigur Gestur Hovgaard: - Fíggjarstøðan er vánalig. Tað er eingin loyna, at fíggjarstøðan hjá KÍ hevur verið vánalig í fleiri ár, men vit arbeiða við at koma burtur úr hesum trupulleikum, sigur hann.

Í løtuni verður arbeitt við at selja KÍ-høllina, sum ítróttarfelagið eigur, til Klaksvíkar Kommunu. Ein søluprísur upp á umleið fýra milliónir hevur verið nevndur, og Gestur Hovgaard sigur, at samráðingarnar við kommununa halda fram.

Um so er, at kommunan keypir høllina frá KÍ, hevði hetta hjálpt munandi um truplu fíggjarstøðuna hjá KÍ.



*Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, váttar at fíggjarstøðan hjá felagnum er sera vánalig*

*Savnsmynd*

## Bygnaðarbroytingar í felagnum

Aðalfundurin hjá KÍ samtykti mánakvøldið nakrar bygnaðarbroytingar og nýggjar lógir, ið væntandi fara at hjálpa leiðsluni í felagnum.

– Hesar broytingar ganga út uppá, at ístaðin fyri at hava eini tríggjar ella fýra ymiskar nevndir, so skal tað framyvir verða soleiðis, at tað bert verður ein nevnd, sum hevur tí fíggjarligu og ítróttarligu ábyrgdina, sigur Gestur Hovgaard og leggur afturat, at leiðslan í KÍ miðjar ímóti at venda skeivu gongdini, soleiðis at komið verður aftur á rætt kjøl.

## Todi blivin pápi

Hóast tað gongur nakað striltið at fáa pláss í FCK-álopinum, so hevur Todi Jónsson annað at fegnast um í hesum døgum

Mánadagin gjørdist føroya fremsti fótbóltsleikari nevnliga pápi fyri fyrstu ferð, tá kona hansara, Andrea, átti eina dóttir.

Dótturin eitur Lucca Hanna Vinten Jónsson, og hon vigaði 2062 gram og var 45 cm long. Mamma og dóttur hava tað gott, sigur Todi á heimasíðu sínari.

**tn**

## Altjóða bridgekapping

Í kvøld verður stóra árliga Eastern Simultan parakappingin í bridge leikt. Kappingin er skipað sum ein simultan kapping, tað merkir, at fleiri túsund bridgespælarar kring allan heimin spæla somu spøl, áleið somu tíð. Alt verður so gjørt upp sum eitt risastórt rað, har ein samlaður vinnari verður funnin.

Í fjørð eydnaðist tað sera flott Boga Simonsen og Símini Lassaberg úr Bridgedeild Kaggans at gerast nr. 6 í heiminum í hesari kapping.

Kappingin í Føroyum verður spæld kl 19:00 í Bridgehúsinum í Havn, har Rói á Rógvu Joensen verður kappingarleiðari. Tilmelding á staðnum.

Gestur Hovgaard, formaður í KÍ

# - Eg kann ikki taka mær av Mjølnir

**Formaðurin í KÍ heldur tað ikki verða hansara uppgáva at bøta um umstøðurnar hjá Mjølnir**

FLOGBÓLTSUMSTØÐUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í flogbóltsfelagnum Mjølnir í Klaksvík eru tey ónøgd við umstøðurnar, sum felagið hevur at virka undir. Í løtuni er næstan alt virksemið hjá Mjølnir í fimleikahallum, men onkuntíð verður sloppið framat í KÍ-høllini. Umboð fyri Mjølnir hava eisini ført fram, at tað kann ikki verða rætt, at hondbóltsfelagið Stjørnan fær nógv betur sømdir enn Mjølnir í KÍ-høllini.

## Stjørnan partur av KÍ

Sum skilst rindar Stjørnan nógv minni í hallarleigu fyri tíman, enn hvat Mjølnir ger í KÍ-høllini. Formaðurin í KÍ, Gestur Hovgaard, vil tó ikki vátta hetta, men sigur: - Stjørnan er ein partur av KÍ, og tí er tað púra náttúrligt, at vit hjálpa Stjørnuni. Eg kann ikki taka mær av, hvussu umstøðurnar hjá Mjølnir eru, tí tað er ikki ein partur av KÍ, sigur Gestur Hovgaard.

## Høvuðsstuðulin kunngjørdur í dag

**Í dag verður almannakunngjørt, at fremsta mansdeildin í fótbólti hevur fingið ein høvuðsstuðul, og hvør stuðulin er**

STUÐULSAVTALA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í morgun verður tíðindafundur í FSF-húsinum, har kunngjørt verður, hvør ið verður fyrsti høvuðsstuðulin hjá fremstu mansdeildini í fótbólti. Sum vit nevndu her í blaðnum í farnu viku, so er tað allarhelst KT-fyritøkan Formula, ið er nýggi høvuðsstuðulin, hóast hetta ikki er váttað.

Við hesari stuðulsavtalu gongur fótbóltssambandið somu leiðir sum hondbóltssambandið, sum undan júst lokna kappingarárið gjørdi avtalu við ávíkavist Sunset og Atlantic Airways um at stuðla ávíkavist kappingina hjá kvinnum og monnum.

# Íblástur til kvinnuvenjarar

**Fótbóltssamband Føroya fer í næstum at skipa fyri einum skeiði, ið skal geva venjarunum hjá kvinnu- og gentuliðum kring landið íblástur**

VENJARASKEIÐ

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Seinasta árið hevur verið dúgligani arbeitt í FSF við at gera okkurt munagott fyri kvinnufótbóltin í Føroyum, sum hevur havt tað trupult seinnu árini. Millum annað skipar FSF um góða viku fyri einum skeiði, har ætlanin er at geva venjarunum hjá kvinnu- og gentuliðum kring landið íblástur.

## Danski landsliðsvenjarin vitjar

Á skeiðnum, sum verður fríggjadagin 1. og leygardagin 2. apríl, fer eitt nú venjarin hjá danska kvinnulandsliðnum, Poul Højmose, at greiða frá egnum hugsanum og royndum at arbeiða við kvinnufótbólti.

Venjarin hjá danska kvinnulandsliðnum, sum telist millum tey sterkastu í heiminum, fer millum annað at tosa um munin á dreingja/mannfólka- og gentu/kvinnufótbólti, og hvussu man arbeiðir langsiktað við venjingini.

Harumframt fara føroyskir skeiðshaldarar at hava innlegg um tekniska venjing, og kvinnuligir leikarar verða við í praktiska partinum av skeiðnum.